# Teistin verið royndartúr

**Nýggja skipið hjá Strandferðsluni hevur verið fyrsta royndartúrin kring oyggjarnar. Fólk vóru væl nøgd við Teistan, sum skal avloysa Trónd á farleiðini um Skopunarfjørð**

ROYNDARTÚRUR
*Stefan í Skorini*



*Teistin var leygardagin tekniskan royndartúr. Sum vera man varð leiðin løgd í Hestfjørð, og her sæst Teistin sigla framvið bygdini úti í Hesti*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Leygardagin var Teistin tekniskan royndartúr. Øll tann tekniska útgerðin, sum ikki kann roynast við bryggju, varð roynd út í odd og egg henda dagin. Menn vóru væl nøgdir við royndartúrin, og alt tóktist at rigga, sum tað skal.

Teistin hevur ligið við bryggju á Skála tað seinasta árið, meðan fólk hava riggað hann til.

Teistin skal í sigling millum Gomlurætt, Hest og Skopun, og tí legði skiparin leiðina í Hest- og Skopunarfjørð, har øll útgerðin skuldi standa sína roynd. Siglt varð framvið Gomlurætt, Hest og Skopun, men skipið legði ikki at. 40-50 fólk vóru við á royndartúrinum.

Enn er ikki møguligt hjá Teistanum at leggja at í Hesti og í Skopun, tí havnirnar ikki eru lagaðar til nýggja skipið enn. Havnin í Skopun skal breiðkast, men tað arbeiðið er ikki byrjað enn, og havnin í Hesti skal gerast soleiðis, at skipið kann leggja rampuna niður á atløgubryggjuna. Hetta er ikki møguligt í løtuni, og arbeiðið er heldur ikki farið í gongd enn.

Tróndur, sum nú er 42 ára gamal, hevur siglingarloyvi fram til 15. apríl. Eftir hetta kann hann ikki sigla við ferðafólki, uttan umbyggingar verða framdar. Tá er ætlanin, at Teistin skal í sigling á hesi farleiðini.

Nú kunnu sandoyingar gleða seg til eina hart tiltrongda útskifting í samferðsluni við meginøkið.

Tann 29. mars verður Teistin handaður Strandfaraskipum Landsins, og tvær vikur seinni verður hann væntandi settur í sigling millum oyggjarnar.

Teistin er 45 metrar langur, 13,10 metrar breiður og stingur 3,1 metrar. Nýggja skipið tekur 33 bilar og 300 ferðafólk um summarið, men bara 200 ferðafólk um veturin. Tá tveir trailarar eru umborð, er pláss fyri 12 bilum.

# Samanhald er lyklaorðið

**– Tað er fyri limirnar, vit arbeiða, og tí má ikki vera ov langt ímillum nevnd og limir. Teir skulu føla, at teir eru ein partur av felagnum, sigur Jana Dalsgaard, nýggj forkvinna í Sjúkrasystrafelag Føroya**

FAKFELAGSARBEIÐI
*Turið Kjølbro*



*– Sjúkrasystrar eiga at læra at siga frá, og ikki uttan víðari taka á seg nýggjar uppgávur sum koma sníkjandi, uttan at lønin fylgir við, sigur Jana Dalsgaard, forkvinna í Sjúkrasystrafelag Føroya*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Jana Dalsgaard vann sannførandi valið um, hvør skal verða forkvinna í Sjúkrasystrafelag Føroya komandi trý árini. Hon fekk tvífalt so nógvar atkvøður sum undanfarna forkvinna, Joan Ziskason, sum eisini stillaði upp. Aðalfundur var í felagnum leygardagin og í gjár var fyrsti arbeiðsdagur hjá Janu sum forkvinna. Serliga fegin er hon um, at nýggja nevndin er væl umboðað bæði fakliga og landafrøðiliga.

– Tað verður lættari at fáa innlit í ymsu starvsøkini, tá alt sjúkrasystraarbeiði er umboðað í nevndini. Eisini er tað ógvuliga hugaligt, at útjaðarin er umboðaður í nevndini, sigur Jana Dalsgaard.

Nógvar stórar avbjóðingar standa fyri framman bæði hvat viðvíkur løn, arbeiðstíð og útbúgvingini hjá sjúkrasystrum.

– Útbúgvingin hjá sjúkrasystrum í londunum rundan um okkum er broytt heilt munandi. Sjúkrasystrafelagið má vera við í kjakinum og við til at mynda útbúgvingina. Stórar broytingar eru farnar fram í heilsuverkinum seinastu nógvu árini og halda fram. Innleggingarnar á sjúkrahúsi eru styttri og heimarøktin fylgir ikki við. Fólk eru illa fyri, tá ið tey koma heima av sjúkrahúsi og tí skulu fleiri fólk setast í heimarøktini og tey skulu eisini útbúgvast, sigur hon.

## Felagið savnast

Heldur enn at kasta seg yvir ov nógvar uppgávur, er eitt høvuðsmál hjá Janu at savna felagið, soleiðis at styttri verður millum nevnd og limir.

– Tað er fyri limirnar, at vit arbeiða í nevndini, og tí má ikki vera ov langt ímillum okkum. Limirnir skulu føla, at teir eru ein partur av felagnum. Fyri betur at síggja, hvar hendir og rørir seg, ætli eg mær at vitja økini. Eg trúgvi, at trupulleikar verða skjótari loystir, tá ið tú ert í tøttum samstarvi við økini. Vit fara at skipa fyri hugnaløtum og vanligum limafundum, har evni verða tikin fram, sum hava áhuga hjá øllum sjúkrasystrum. Á henda hátt ber til at savna felagið bæði fakliga og á annan hátt. Hetta er gliðið út í seinastuni, sigur Jana Dalsgaard.

## Fakfelagsarbeiði ikki ókent

Jana Dalsgaard er 45 ára gomul og ættað úr Rituvík. Fakfelagsarbeiði er henni ikki ókent. Hon hevur í grundini arbeitt seg upp frá botni av. Eftir at hon fekk útbúgving í 1981 og til 1997, hevur hon arbeitt sum sjúkrasystir á B5 á Landssjúkrahúsinum. Frá 1992 til 1997 hevur hon arbeitt sum sjúkrasystir í viðtaluni hjá P. Højgaard, kommunulækna, um somu tíð, sum hon hevur verið parttíðarsett á B5. Frá 1989 til 1996 hevur hon verið álitisumboð fyri skurðdeildina á Landssjúkrahúsinum. Í tvey ár var hon felagsálitisumboð fyri Landssjúkrahúsið. Størsta uppgávan var tá at verja sjúkrarøktina í stóru skerjingunum, sum vórðu gjørdar í kreppuárunum. Í sløk tvey ár var hon nevndarlimur í Sjúkrasystrafelag Føroya, í tvey ár las hon løgfrøði við lærda háskúlan í Århus, og seinasta hálvt annað árið hevur hon aftur arbeitt í viðtaluhølunum hjá P. Højgaard, kommunulækna.

Umframt Janu Dalsgaard vórðu hesar valdar í nevndina: Óluva Lómstein, næstforkvinna, Anna Maria Simonsen, Æna Reinert, Hervør Zachariasen og Elsa Vest, nevndarlimir, og Anna Samuelsen, eykalimur.



# Vekja áhuga fyri yrkingum

**Í kvøld lesa Turið Sigurðardóttir og Gunnar Hoydal upp yrkingar, teimum dámar væl, í Norðurlandahúsinum**

SKALDSKAPUR
*Turið Kjølbro*



*- Yrkingakvøldini eru eitt høvi, har fólk hava møguleika at hoyra góðar yrkingar verða lisnar upp, og so kunnu øll siga sína meining, sigur Oddfríður M. Rasmussen*

Í kvøld kl. 19.30 verður yrkingakvøld í Norðurlandahúsinum. Hesa ferð eru tað Turið Sigurðardóttir og Gunnar Hoydal, sum lesa upp yrkingar, ið teimum dámar. Seinasta týskvøld var eisini yrkingakvøld. Tá lósu Carl Jóhan Jensen og Petur Jensen upp yrkingar. Eittans 13 áhoyrarar vóru til tiltakið, og tað heldur Oddfríður M. Rasmussen, sum fyri Norðurlandahúsið skipar fyri tiltakinum, er alt ov lítið.

- Í Rithøvundafelagnum eru 90 limir og teir flestu búgva í Havn, so grundarlag eigur at vera fyri einum tiltaki, har yrkingar eru á breddanum. Í Føroyum verður skaldskapur als ikki kjakaður. Yrkingakvøldini eru so eitt høvi, har fólk hava møguleika at hoyra góðar yrkingar verða lisnar upp og so kunnu øll siga sína meining. Eg hopi, at vit fáa eitt gott kjak, sigur Oddfríður M. Rasmussen.

Seinast varð tiltakið hildið í Klingruni. Hon var alt ov stór til eina so lítla fjøld. Tí verður yrkingatiltakið í kvøld annaðhvørt í Dansistovuni ella í caféteriuni. Hetta er seinasta yrkingakvøldið á hesum sinni.

# Hvørjar bøkur vóru í húsunum fyrr

**Elin Mortensen hevur vunnið kapping, har hon hevur skrivað ritgerð um gamlar bøkur**

KAPPING
*Turið Kjølbro*



*Elin Mortensen, fyrrverandi lærari, í Havn*

Fyri tveimum árum síðani skrivaði Fróðskaparsetur Føroya út ritgerð-arkapping við heitinum: Gamlar bøkur. Hvørjar bøkur vóru í húsunum fyrr? Kappingin er nú lokin og inn komu fýra handrit. Ein dómsnevnd við trimum fólkum hevur mett handritini. Í dómsnevndini sótu Martin Næs, landsbókavørður, Turið Sigurðardóttir, bókmentafrøðingur og Jóan Pauli Joensen, fólkalívsfrøðingur. Dómsnevndin hevur gjørt av at lata Elini Mortensen í Tórshavn eina virðisløn á 1000 krónur. Hinir tríggur luttakararnir fáa bókagávu.

Fróðskaparsetrið fer í næstum at skriva út nýggja ritgerðakapping. Nærri verður greitt frá hesum í fjølmiðlunum.

# Føroya Tele hevur stórt avlop

**Á nevndarfundi hjá Føroya Tele hevur leiðslan lagt roknskapin fyri 2000 fram. Ársúrslitið er 30,6 milliónir krónur, og hetta er 4,5 milliónir betri enn í 1999, hóast felagið hevur framt príslækkingar**

ÁRSROKNSKAPUR
*Stefan í Skorini*

Føroya Tele sigur seg kunna vísa á eitt gott fíggjarligt úrslit í farna ári, nú roknskapurin hjá felagnum er liðugur og klárur at leggja fram á aðalfundinum tann 30. mars. Og tað er hugaligur lesnaður hjá leiðsluni.

Føroya Tele hevur havt eina framgongd í ársúrslitinum uppá 4,5 milliónir í mun til 1999. Ársúrslitið í 2000 gjørdist 30,6 milliónir krónur, eftir at 5,7 milliónir eru settar av til skatt og 2,9 milliónir eru goldnar í landskassan fyri konsessiónsloyvi og rakstur av Fjarskiftiseftirlitinum.

Í 1999 var ársúrslitið 26,1 milliónir krónur, og sostatt er talan um ein vøkstur í úrslitinum við 17,2 %.

## Økt søla

Avlopið kemst mest av øktari sølu frá teimum nýggjaru tænastunum. Nettosølan øktist við10,3 % úr 219,4 milliónum krónum í 1999 til 242,1 milliónir krónur í 2000.

Vøksturin í nettosøluni stavar frá GSM fartelefoni, internettænastuni og telebúðarsølu. Hinvegin lækkaði nettosølan á fastnetinum vegna takstlækkingar fyrst í árinum. Hetta upplýsir Føroya Tele í tíðindaskrivi.

Føroya Tele hevði eina stóra kundatilgongd í árinum, sum fór. Tilgondin var 58 % á fartelefonøkinum, og tað hevði við sær, at inntøkurnar øktust við 54 % á hesum øki.

Roknskapruin vísir eisini ein íløguvøkstur á góðar 20 milliónir samanborið við 1999. Í 2000 vóru íløgur gjørdar fyri 57,8 milliónir samanborið við 34,5 milliónir í 1999. Føroya Tele hevur goldið 28,1 milliónir í avdráttum, og langfreistaða skuldin er nú komin niður á 93,9 milliónir krónur.

Samlaði eginpeningurin í felagnum var 157,7 milliónir við árslok, svarandi til eitt trygdarevni uppá 45,9%.

## Væl nøgd

Leiðslan í felagnum sigur seg vera sera væl nøgda við ársroknskapin, men vísir samstundis á, at neyðugt er at menna uttanlandasamskiftið við nýggjum millumlanda kaðalum. Haraftur at verður neyðugt at gera íløgur í nýggja tøknifrøði, so at felagið framhaldandi kann bjóða viðskiftafólki sínum nýggjar og framkomnari tænastur.

Leiðslan metir, at veitingarskyldan er ein tung byrða, nú kappingin harðnar í hvørjum.

– Veitingarskyldan og íløgutørvurin gera tað neyðugt, at Føroya Tele framhaldandi megnar at skapa góð fíggjarlig úrslit, skrivar Føroya Tele í tíðindaskrivinum.


